# Eingin broyting



*Formaður Tjóðveldisfloksins og virkandi mentamálaráðharrin slær fast, at avgerðin hjá Annlis Bjarkhamar var røtt, tá hon setti Steffen Stummann Hansen sum landsantikvar. Hann sigur seg hava enn størri virðing fyri henni sum persóni, eftir at hava sett seg inn í málið. Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Høgni Hoydal er ikki í iva um, at avgerðin hjá Annlis Bjarkhamar var røtt, tá hon setti Steffen Stummann Hansen í starv sum landsantikvar. Málið fer nú til Umboðsmannin**

LANDSANTIKVARUR
*Heri á Rógvi*

Mánadagin byrjar Steffen Stummann Hansen sum landsantikvarur og leiðari fyri Føroya Fornminnissavn.

Hetta er enn einaferð staðfest av Høgna Hoydal, virkandi landsstýrismanni í mentamálum.

Hann hevur boðað Magistarafelagnum og almenninginum frá, at hann metir og hevur fult álit á avgerðini hjá Annlis Bjarkhamar, at seta Steffen Stummann Hansen í starv sum landsantikvar, hóast ein setanarnevnd tvær ferðir mælti til at seta Símun V. Arge í starvi.

»Í hesum ítøkiliga máli kann undirritaði sum settur landsstýrismaður í mentamálum siga greitt, at undanfarni landsstýrismaður hevur eftir míni meting og neyvu gjøgnumgongd av málinum, handlað rætt og við greiðum grundgevingum í øllum málinum.«

Soleiðis skrivar Høgni Hoydal í brævi til Magistarafelagið.

Við Sosialinum hósmorgunin sigur landsstýrismaðurin, at tað er fyri honum eingin ivi um, at Annlis Bjarkhamar hevur handlað rætt í málinum.

– Eg havi lisið alt málið væl og virðiliga ígjøgnum. Hetta málið er sera væl dokumenterað, og eg havi staðfest, at Annlis Bjarkhamar hevur handlað rætt, sigur Høgni Hoydal.

Virðingin fyri Annlis Bjarkhamar er størri enn nakrantíð.

– Fyri at siga sum er, so havi eg havt stóra virðing fyri Annlis Bjarkhamar, og virðingin er vorðin enn størri, eftir at hava gjøgnumgingið hetta væl grundaða mál, sigur Høgni Hoydal.

Løgmaður tók avgerðina at siga Annlis Bjarkhamar úr starvi útfrá politiskum atlitum.

Og Høgni Hoydal vil ikki gera viðmerkingar til tann politiska partin, sum flokkurin í løtuni viðger. Hann vil eisini siga nakað um tann fyrisitingarliga partin, har hann er komin til somu niðurstøðu sum Annlis Bjarkhamar.

Magistarafelagið og starvsfólkið á Fornminnissavnið hava fleiri ferðir heitt á landsstýrismannin um at fáa ógilda setanina, men hesa áheitan hevur Høgni Hoydal ikki valt at fylgt, tí hann kennir tað sum um, at alt er farið rætt fram í málinum.

## Harmligt

Høgni Hoydal sigur seg harmast um, at málið er komið út alment, og ein tílík setan eigur ikki at verða viðgjørt í fjølmiðlunum. Magistarafelagið hevur eisini gjørt greitt, at felagið harmast um, at málið er vorðið so nógv viðgjørt í fjølmiðlunum.

– Eg harmist stórliga, at málið er vorðið til eitt alment mál, tí hetta átti ongantíð at verið komið fyri, og eg ætli mær eisini – eins og Annlis Bjarkhamar – at finna útav, hvussu hetta er komið út alment. Samstundis gevur hetta høvi til viðgera almenna setanarpolitikkin. Eftir mínum tykki hevur Annlis Bjarkhamar ikki brotið nakra setanarpolitikk, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin heldur, at alt ov nógvar mýtur eru skaptar í sambandi við setanina, og hann vil fegin fáa hesar út av verðini.

– Eftir mínum tykki er einki skeivt gjørt í málinum. Málið skuldi bara ongantíð verið komið út alment, sigur Høgni Hoydal.

## Til umboðsmannin

Magistarafelagið ætlar ikki at sleppa málinum her, hóast tey ikki hava meira við Mentamálaráðið at tosa um.

Felagið ger greitt, at tey fara at senda løgmanni eitt skriv, og málið verður eisini lagt fyri umboðsmannin.

Løgtingsinsumboðsmaður, Joen H. Andreasen, sigur við Sosialin, at hann kann viðgera málið og siga sína hugsan, men hann hevur onga heimild at broyta eina fyrisitingarliga avgerð.

## Samanumtikið

Niðanfyri prenta vit síðsta part av brævinum hjá Høgna Hoydal til Magistarafelagið. Skrivið er ov drúgt at prenta í fullar longd, so vit hava tikið eitt brot burturúr.

»Samanumtikið kann verða sagt, at landsstýrismaðurin ikki hevur gjørt nakað brot í hesum máli, ella hevur gjørt annað enn at tryggja eina javnbjóðis, væl grundgivna og skjalfesta viðgerð av umsøkjarum. Landsstýrismaðurin hevur setanarrættin og fyrisitingarligu ábyrgdina í hesum máli. Avgerðin varð tikin eftir at landsstýrismaðurin hevði sett seg so væl inn í málið sum gjørligt – fyri at taka røttu avgerðina.

Harafturat kann vera sagt, at landsstýrismaðurin metir tað vera ein stóran trupulleika í hesum máli og fyri starvsfólkapolitikk og trygd umsøkjaranna sum heild, at ein almenn viðgerð er farin fram av umsøkjarum, sum ikki kunnu verja seg, og har sjálvsagt ikki er møguligt at fáa allar faktuellar upplýsingar fram í einum starvssetanarmáli. Summir upplýsingar, ið eru fevndir av tagnarskyldu, eru eisini lagdir fram í almenninginum, og landsstýrismaðurin hevur tikið stig til at kanna, hvussu hetta er hent.

Viðgerðin av hesum máli gevur eisini góða orsøk til at viðgera setanarpolitikk og mannagongdir sum heild, soleiðis at ongar misfatanir eru millum setanarmyndugleikan, fakfeløg, umsøkjarar og almenning.

Í hesum ítøkiliga máli kann undirritaði sum settur landsstýrismaður í mentamálum siga greitt, at undanfarni landsstýrismaður hevur eftir míni meting og neyvu gjøgnumgongd av málinum, handlað rætt og við greiðum grundgevingum í øllum málinum.

Annars er at siga, at Mentamálaráðið fegin frættir aftur frá Magistarafelagnum. Møguleiki er eisini fyri fundi partanna millum, um Magistarafelagið er áhugað fyri hesum. Vónandi letur hetta samskifti millum landsstýrismannin og Magistarafelagið upp fyri eini virðiligari loysn fyri allar partar í málinum.«

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá løgmanni áðrenn evstamark.



# Tað verður ein øðiligur samanbrestur

**Tað er lagt upp til eitt stríð av teimum heilt stóru, tá fótbóltskappingin fyri tónleikarar verður í ítróttarhøllini á Kambsdali um 10 dagar. Nógv spennandi lið hava teknað til kappingina, og Dynamitt lovar at spreingja alt í luftina**

MUSIKALSKUR FÓTBÓLTUR
*Pop.fo*



*Niels Uni og hinir í MC Hár fara at royna seg sum fótbóltsspælarar í serligari innandurakapping, sum verður um eina góða viku*

Um 10 dagar verða strikurnar kritaðar, bólturin verður pumpaður við luft, og lissurnar á skónum budnar fastar.

Pallurin verður ítróttarhøllin á Kambsdali, høvið er fótbóltskapping fyri tónleikarar, og undirhaldið verður betur enn nakratíð.

Soleiðis er støðan, nú niðurteljingin av álvara er byrjað til stóra tiltakið, sum skal geva eina ábending um, hvussu kendir tónleikarar standa seg á einum fótbóltsvølli.

Kappingin verður á Kambsdali leygardagin 22. mars frá kl. 12.00, og tónleikarar, fjølmiðlafólk og onnur við tilknýti til tónleikalívið fara at kappast. Higartil hava fleiri enn 80 mans teknað til kappingina, og liðini eru sera áhugaverd.

## Stjørnulið úr Sortudíki

Útvarpið hevur manna eitt dreymalið av útvarpsvertum, og teir ætla sær ikki lítið, hava vit frætt frá álítandi keldum í Sortudíki.

Royndir tónleikarar bjóða eisini av, og teir í Mjølnir siga, at teir verða í øllum førum tryggir vinnarar, tá ið tað skal vigast aftaná kappingina.

MC Hár bjóða seg eisini fram, og tað sigst, at Niels Uni ætlar at spæla í klæðum allatíðina. Harafturat hava nólsoyingar eisini tekna eitt lið til – altso bara eitt.

## Vandamikið evni

Eftir drúgvar samráðingar hava teir tiltiknu Dynamitt'arnir gjørt av at tekna seg til kappingina, og teir lova at spreingja alt í luftina.

Niklas Heri Jákupsson og hansara menn er kendir fyri at fáa lív í eina áhoyrarafjøld, og tá ið fótbóltskappingin er av leygardagin, verður kósin sett ímóti pallinum í Mentanarhúsinum í Fuglafiði, tí umframt fótbóltskappingina verður eisini veitsla við køldum borði í Mentanarhúsinum.

Aftaná verður almennur dansur, har tónleikararnir sleppa at jamma. Eisini verður ein plátuvendari við.

## Freistin longd

Nú rættilig ferð er komið á tilmeldingarnar, hava fyrireikararnir gjørt av at leingja freistina í nakrar dagar, so áhugaðir tónleikarar fáa møguleikan at smekka til og tekna seg til kappingina.

Tilmeldingin kann gerast umvegis heimasíðuna www.pop.fo, og freistin fyri at tekna til fótbóltskappingina og veitsluna er sett til týsdagin 18. mars.

## Liðini

**Her er eitt yvirlit yvir liðini, sum longu hava teknað til kappingina.**

**Mjølnir**
1. Hermund Jacobsen
2. Petur Mohr Reinert
3. Arnbjørn Sivertsen
4. Ragnar Rubeksen
5. Torkil Johannesen

**Devalu**
1. Líggjas Olsen
2. Flóvin E. Viderø
3. Rúni W. Højgaard
4. Bárður Johannesen
5. Rógvi Rasmussen
6. Jan Zachariasen

**MC Hár**
1. Heri Reynheim
2. Jónas Bloch Danielsen
3. Poppers á Heygum
4. Rani MC Hammershaimb
5. Niels Uni Dam

**Lawetz**
1. Sveinur Dam
2. Ísak Sambleben
3. Høgni Fagraberg
4. Høgni Reistrup
5. Dávur Juul Magnussen
6. Torkil V. Rasmussen

**Ludomania**
1. Kristian í Vági
2. Mikael Blak
3. Halgir Arge
4. Uni Debes
5. Sveinur Gaard Olsen
6. Hallur Johannesen

**Grót**
1. Niels Pauli Lamhauge
2. Sólarn Solmunde
3. Petur Pólsson
4. Símun Skorðastein
5. Jens L. Thomsen
6. Hansmar Poulsen

**Mentanarhúsið í Fuglafirði**
1. Eyðun Hansen
2. Jan Jacobsen
3. Samson Nesá
4. Jan Rúni Poulsen
5. Jóhannus Steingrund

**All That Rain/Masha**
1. Henning Hjalt Nicodemussen
2. Jens Tummas Ness
3. Hans Ravnsfjall
4. John Jacobsen
5. Alvin Wang Ísakson

**Ataja**
1. Allan Hjaltalin
2. Petur Háberg
3. Pætur á Borg
4. Bogi á Borg
5. Kristoffur Mørkøre

**Dryspell**
1. Jóannes Lamhauge
2. Sámal Rasmussen
3. William Souvy Olsen
4. Martin Andreas Kruse
5. Dan Bláberg

**Playmate**
1. Ragnar Djurhuus
2. Tróndur H. Olsen
3. Jógvan Jacobsen
4. Nikolaj Falck
5. Rógvi Johansen

**Terji Rasmussen**
1. Magnus Johannesen
2. Rógvi á Rógvu
3. Hjalti Joensen
4. Johannus á Rógvu Joensen
5. Terji Rasmussen

**Radiohøvdini**
1. Jákup Magnussen
2. Rúni Jákupsson
3. Bjarni Mohr
4. Heðin Arge
5. Búgvi Øster

**FC Nólsoy**
1. Súni Joensen
2. Brian Hansen
3. Mikkjal Holm
4. Bjarni Hansen
5. Petur Hans Poulsen

**Blood of Lucifer**
1. Oddur Olsen
2. Óli Joensen
3. Johnny Djurhuus
4. Hjalmar Holm
5. Esben Debes
6. Tróndur Johannesen

**Dynamit**
1. Niklas Heri Jákupsson
2. Ingi Isaksen
3. Hans Jákup Nystrøm
4. Jógvan Mørkøre
5. Jógvan Hansen


